

Jórun Gardar, skrivari í Oljuvinnufelagnum. Mynd Jan Müller/oljan.fo

# Føroyskar fyritøkur standa seg í altjóða oljuvinnu

**Jan Müller**

24.06.2015 - 08:28

Oljan.fo

**Føroysk veitingarvinna hevur nú í eina tíð av álvara bjóðað seg fram í oljuvinnuni við sera góðum úrsliti. Tað vísir seg nevniliga, at føroyskar fyritøkur standa seg í kappingini í altjóða oljuvinnuni.**

**Hetta var ein av boðskapunum hjá Jórun Gardar, skrivara í Oljuvinnufelagnum á ráðstevnuni Atlantic Fair í Klaksvík herfyri, hvørs framløguheiti var: "Frá førleikamenning til tænastudepil í Atlantshavi."**

Hon helt fyri, at hetta vóru ikki bara tóm orð: "Vit hava góð úrslit at vísa á, fyritøkur fáa góð ummæli, og vit eru kappingarfør í mun til kostnað." Og Jórun helt fram:

“Okkara royndir frá sjólívinum havi viðført, at fyritøkur hava megnað at umstilla sínar tænastur serstakliga skjótt. Í dag eru vit fullvæl kappingarfør á altjóða marknaðinum.”

Oljuvinnufelagið hevur ábyrgdina av føroyska landabásinum á komandi oljumessu í Aberdeen, og Jórun greiddi eisini frá hesum tiltakinumog helt fyri, at tað er týdningarmikið, at føroyskar fyritøkur eru við, tá slíkar stórar oljuráðstevnur og messur eru í útlondum.

“Messan í Aberdeen er ein partur av arbeiðinum, har fyritøkur fáa samband við kundar og eisini fáa nýggjar kundar. Í Aberdeen 2015 verður tí gjørt nógv burturúr at marknaðarføra Føroyar og teir førleikar føroysku veitararnir hava”.

Oljumessan í Aberdeen verður í døgunum frá 8. Til 11. September og verða umboð fyri einar sjey føroyskar fyritøkur og kommunur við.

Í framløgu síni í Klaksvík gjørdi Jórun Gardar annars nógv burtur úr oljutilgongdini seinastu mongu árini fram til í dag.

Er ynskiligt at fáa meira at vita um áhugaverdu framløguna ber til at venda sær til Oljuvinnufelagið.






